

Nú Jarðfeingi hevur latið Statoil loyvi at bora aftur á føroyska landgrunninum, fara frálandaskipini Sjóborg og Esvagt Don at loysa frá landi við kós móti Brugdan 2 leitimiðinum. Mynd: Jan Müller/oljan.fo

# Loysa frá landi: Loyvi latið Statoil at bora

**Jan Müller**

09.05.2014 - 21:02

Oljan.fo

**Jarðfeingi sigur í dag frá á síni heimasíðu, at oljufelagið Statoil hevur fingið játtað loyvi at bora brunnin Brugdan 2, sum er framhald av boring frá 2012. Sett verður á at bora í vikuskiftinum.**

Við heimild í kolvetnislógini hevur Jarðfeingi í dag givið Statoil Faroes loyvi at fara undir boring av brunninum 6104/21-2 T2, eisini nevndur Brugdan ll.
Byrjað varð at bora brunnin í 2012, men boringin varð steðgað av tí, at komið varð út á vetrartíð.

Boringin verður gjørd av boripallinum, West Hercules, ið er ávegis til Føroya.
Væntandi verður sett á at bora í vikuskiftinum sigur Jarðfeingi frá á síni heimasíðu.

Brunnurin verður boraður í loyvi nr. 006, har Statoil er fyristøðufelag. Hinir loyvishavararnir eru ExxonMobil, OMV og Atlantic Petroleum.

Knattstøðan er 60° 15´ 42.733” N og 04° 59´48.902” W.

Tá hesin brunnurin er liðugur, verður farið undir brunnin 6104/25-1, eisini nevndur Súlan-Stelkur í loyvisøki 008.